tíðindablaðið
# sosialurin

Nr. 26 Mikudagur 7. februar 1996 70. árgangur Krónur 7,00

## Oljufepurin farin at ganga í Lopra:



*Teir sum vilja bora í Lopra hava brúk fyri meira lendi, men lopransfólk halda onga grund vera fyri at lata tað alt ov bíliga. - Boringin kann útvega samfelagnum ótaldar milliónir í inntøku, so nakað mugu vit hava fyri lendið, sigur Jákup í Lopra, hagastýr*

# Nú tevjar hann krónur

*síða 11*

---

### Aksel Hansen um ørskapin við Fiskavirking

# Vit fáa tvífalt so nógv virki



*Aksel Hansen er her avmyndaður sum reiðari á fundi í gjár um tilmælið um fiskidagar. Høgrumegin sæst Ásmundi Justinussen. Meira um hetta málið er á síðu 5.*

**Aksel Hansen, fyrrverandi stjóri á Baccalao í Havn, er als ikki samdur við Bjarta Mohr, sum heldur, at Fiskavirking hevur bjargað føroyska fiskiídnaðinum. Aksel Hansen ber saman við støðuna í Grønlandi. - Tað sum nú hendir har, hava vit longu sæð her heima. Í Leirvík letur nýtt virki upp við síðuna av virkinum hjá Fiskavirking. Selur Fiskavirking ikki virkini skjótt, vera tey ikki seljandi.**

*síða 18*

fk
HVØNN DAG Í FEBRUARI
Døgurði
fyri
BERT 25 kr.!
- bert galdandi, um etið verður í matstovuni -
Matstovan í Hoyvík

ONDINE

Klassiskur tónleikur
í heimsklassa. Vit hava fingið hopin av fløgum heim úr Finnlandi
Fløgur frá ONDINE
Fyri hvørja........ 149:-
TUTL
SMS • TLF 14988

# Oljufepur farin at ganga í Lopra

*Teir, sum skulu bora í Lopra hava brúk fyri meiri lendi, men lopransfólk halda onga grund vera fyri at láta tað alt ov bíligt*



*Jákup Joensen hyggur niðan í Lopranshagan. Hann ætlar ikki at láta lendið fyri einki*

AKI BERTHOLDSEN

Oljufepur er longu farin at herja í Lopra áðrenn fyrstu oljudropin ikki er komin upp enn.

Tey gomlu søgdu, at ein skuldi ikki kanna sær bitan fyrrenn hann var svølgdur, men í Lopra tevja tey gull, nú alt hetta tosið um oljuna hevur tikið seg upp.

Teir, sum skulu bora eftir olju, hava brúk fyri fittum lendi rundanum boriholið. Landsverkfrøðingurin leigaði 3 000 fermetrar frá haganum á sinni, men nú borast skal av nýggjum, hevur borifelagið biðið um 2 000 fermetrar afturat.

Økið liggur í Lopranshaganum og landsverkfrøðingurin hevur spurt seg fyri hjá hagastýrinum um møguleikarnar fyri at leiga hesar 2 000 fermetrarnar.

Lopransmenn vísa ikki fyrispurninginum aftur, men skal ein trúgva søgunum, sum ganga, ætla teir at leggja nógv á.

Onkur, sum heldur seg vita, sigur, at hagastýrið hevur kravt minst 100.000 krónur fyri at leiga oljumonnunum burturav haganum.

Onnur, sum eisini halda seg vita, pína uppá, at kravið heldur er nærkast 200 000 krónur.

Tað skuldi heldur ikki verið ómøguligt hjá lopransfólki at spunnið gull burturúr oljuni, eisini áðrenn hon er komin, tí formaðurin fyri hagastýrinum er ongin annar enn kendi vinnulívsmaðurin, handilsmaðurin og løgtingsmaðurin, Jákup Joensen.

Tú skalt ikki trúgva øllum tú hoyrir, sigur hann, tá ið vit spurdu, hvussu nógv teir ætla sær fyri hagan.

Hann váttar tó at fyrispurningur er komin um at fáa 2 000 fermetrar burtur av haganum.

Men hann vil ikki leggja nakra krónutal á.

-Vit skulu samráðast um leiguna og tú skilir, at slíkar samráðingar kunnu ikki fara fram í bløðunum, sigur Jákup í Lopra.

Men eftir hvat skilst, er ikki ætlanin at lendið skal verða givið.

-Lendið, sum landsverkfrøðingurin leigar nú, leiga teir fyri 1 krónu fyri fermeturin fyri árið.

So bíligt sleppa teir ikki aftur, skilst, tí nú er søgan ein heilt onnur, sum Jákup tekur til.

-Hetta er talan um sera týdningarmikið arbeiðið, sum kunnu verða grundarlag undir sera stórum íløgum, sum kann útvega samfelagnum ótaldar milliónir í inntøku. So nakað mugu vit hava fyri lendið, skilir tú.

-Hava teir brúk fyri lendinum, mugu vit semjast um avtalu og tað verða onnur tøl, enn vit eru von við, sigur Jákup í Lopra.

Hann viðgongur eisini, at hava teir brúk fyri lendinum, er samráðingarstøðan hjá hagastýrinum sterk.

## Aalborg

Føroyskt møti verður leygardagin 10. febr. kl. 19 í Betania kirkjuni, Dag Hammerskjølds Gade 2. Unni Rasmussen talar.

Øll eru vælkomin

## Føroyingafelagið í Aalborg

Opið er hvørt mánakvøld og hvørt mikukvøld og annaðhvørt týskvøld og hóskvøld. Hvønn leygardag er opið fyri børnum frá kl. 11–15.

Hvørt leygarkvøld er opið hús frá kl. 22–02.

Føroyingafelagið
í Aalborg
Lille Kongensgade 10
(í garðinum á 1. hædd).



### Dvørgar flenna í fjøllum

*Náttardun og kolasvørt niða,*
*trongdar mannasálir stirdar biðja,*
*lotar av ódn,*
*stíga fram risar døkkir,*
*arnakvæði veitir tøkkir,*
*fjálir av skomm myrkrið síni børn?*

*Tónarnir harðna í fjøllum,*
*vargvillur dansur í høllum,*
*dundur og toruljós,*
*skyggjandi metal frá sprundum og køllum*
*drukkin látur frá børnum snjøllum,*
*roðnar av skomm hitt aldagamla drós?*

*Fjølment ættarlið í høllum dansa,*
*vargvakrar síðir tey kransa,*
*meðan dvørgar flenna í fjøllum,*
*tí tannleys og grá er hon,*
*sum á nátt upptekur tann son,*
*ið ikki unnar at dansa í høllum.*

**Baraldur á Berhellu**
*20/1-96*


## Um nóg stórur áhugi er, skipar STH fyri skeiði í
# ENSKUM FYRI BYRJARAR

Skeið nr. 96005.2

Eftirútbúgving fyri yrkislærd á skrivstovum og í handlum.

Skeiðið er ætlað teimum, sum á ein ella annan hátt halda at tey duga ov illa at nýta enskt mál í talu.

A skeiðnum miða vit ímóti at skeiðluttakarin lærir at samrøða við fólk við ymsum áhugamálum og trupulleikum, tað verði seg innan ferðafólkavinnuna ella annað.

Vit arbeiða út frá eini byrjunarbók, sum eisini gevur møguleika at tríva í eitt sindur av mállæru, men høvuðsdentur verður lagdur á samrøðuna soleiðis at skeiðluttakarin kann fáa nyttu av tí, sum honum tørvar í dagligum yrki og somuleiðis eisini verður vandur at tosa enskt.

**Tíð:** 28 skúlatímar
týsdagin 13. februar, mikudagin 14. februar 1996
týsdagin 20. februar, mikudagin 21. februar 1996
týsdagin 27. februar, mikudagin 28. februar 1996 og
týsdagin 05. mars
Allar dagar kl. 8.30–12.00

**Luttakaratal:** Pláss er fyri 10–16 fólkum

**Stað:** Føroya Handilsskúli í Tórshavn

**Skeiðleiðari:** Martha W. Dalsgaard

**Kostnaður:** kr. 1.320,00 fyri yrkislærd treytað av góðkenning Læruráðsins og kr. 2.620,00 fyri onnur áhugað, íroknað er frálæra, skeiðtilfar og matur.

Fráboðan um luttøku *sum skjótast*. Feløg, virkir, stovnar og bólkar eru vælkomin at biðja um tilboð.

Tilmeldingarblað fæst á Føroya Handilsskúla í Tórshavn.

**SKEIÐTÆNASTA HANDILSSKÚLANS * STH**
**útbúgving, eftir- og viðarlútbúgving á Føroya Handilsskúla**
**Postamoga 177, Marknagilsvegur 77, 110 Tórshavn, Tlf. 17177, Fax 13374**

STH